# Gamla bygdagøtan sett í stand



Í summar hava menn arbeitt við at umvæla gomlu bygdagøtuna millum Leirvík og Gøtu, so hon aftur bleiv trygg og góð at ganga hjá teimum flestu.

Bygdagøtan var illa farin av tíðarinnar tonn. Fyri nørkum árum stíðani tóku leirvíkingar stig til at umvæla gøtuna Leirvíksmegin, og í ár hava gøtumenn so umvælt hana Gøtumegin. Nú er arbeiðið liðugt, og sunnudagin var eitt fylgi og skoðaði og royndi verkið. At ganga bygdagøtuna millum Gøtu og leirvík er ein góð útferð. Ferðin er rímiliga løtt og tekur umleið ein tíma. Á vegum eru sera vakurt útsýni í allar ættir, skrivar Eysturkommuna á heimasíðu síni.

# Føroyingur besti íleggjari í Danmark týsdagin

**Ein av luttakarunum í Íløguspælinum hjá Føroya Banka telist millum bestu íleggjarnar í samlaða íløguspælinum hjá danska vinnublaðnum Børsen. Í stóra íløguspælinum kappast yvir hálvtrýss túsund luttakarar um at gera mest lønandi íløgurnar næstu fýra mánaðarnar**

ÍLØGUR
*Tíðindaskriv*
*post@sosialurin.fo*

Hesin luttakarin í íløguspælinum nevnir seg MariusJ og liggur í løtuni ovast í kappingini hjá Føroya Banka, har viðkomandi eftir bert tvær vikur hevur skapt ein vinning á yvir 33.000 krónur við teimum 250.000 krónunum í spælipengum frá byrjan. Hetta svarar til ein vinning á 13.3%. Í donsku kappingini liggur MariusJ týsdagin eisini á fyrsta plássi.

Allir luttakarar í Íløguspælinum hjá Føroya Banka eru eisini við í stóru kappingini hjá Børsen, har høvuðsvinningurin er ein Lexus bilur fyri yvir 600.000 krónur. Eydnast tað einum av luttakarunum í íløguspælinum hjá Føroya Banka at enda ovast í samlaðu kappingini, kann viðkomandi soleiðis strúka avstað við tveimum bilum. Høvuðsvinningurin í føroyska spælinum er ein Toyota Aygo frá Reyni Service.

Luttakarnir í íløguspælinum hjá Føroya Banka kunnu eisini fylgja við hvørjar íløgur hinir spælarnir hava gjørt. Og verður hugt eftir íløgusamansetingini í bestu portefølju hjá MariusJ, kann staðfestast, at íløgusamansetingin í løtuni eru fleiri rávørur umframt norski stórbankin DnB NOR, danska vindmyllu-framleiðarin Vestas og norska oljuleitingarfelagið DNO.

